# Slapp við treytaðari revsing


*modelmynd*

**Ein 28 ára gomul kvinna fekk í Føroya fríggjadagin rætti dóm fyri at hava kastað við einum glasi inni á einum diskoteki í Havn. Dómurin var fongsulsrevsing, men revsingin var treytað**

FØROYA RÆTTUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tú veitst ikki altíð, hvat tú kemur út fyri, fert tú í býin um vikuskiftið.

Eitt leygarkvøld í juni í fjør fóru eini ung hjún á diskotek í Havn.

Har sá maðurin eina kvinnu, sum stóð og togtogaðist við ein dana um ein kepp, og keppin átti danin.

Maðurin fór so og hjálpti dananum at fáa keppin aftur.

Tá spann øði í kvinnuna, sum langaði manninum ein undir vangan, og kona hansara fekk albogan á kvinnuni undir síðuna.

Og tá bleiv henda kvinnan ill og frustrerað og tveitti glasið, sum hon hevði i hondini, frá sær. Glasið fór í nakkan á kvinnuni, sum hevði barst um keppin.

- Eg ætlaði ikki at raka hana, var bara so frustrerað av, at maðurin var sligin, segði kvinnan, sum tí hon kastaði glasið var ákærd fyri harðskap.

Tann ákærda kvinnan helt, at tað vóru so nógv fólk inni, at hon tað sama kundi havt rakt onkran annan.

Kvinnan, sum fekk glasið í høvdið, fór á skaðastovuna, og hóast glasið ikki brotnaði, hevði tað givið henni eina skeinu í hárbotnin, og hon fekk tvær pentur.

Ákærin helt uppá, at tað ikki var av tilvild, at glasið rakti júst ta kvinnuna, men hin helt við sítt.

## Tilvildarligt eitt rættarmál

Kravið hjá ákæranum var 40 daga treytað fongsulsrevsing. Hann helt, at fólk høvdu rætt til at fara í býin uttan at soleiðis at fáa eitt glas í høvdið. Sjálvt um hin kvinnan kanska hevði verið úti um tað sjálv, átti slíkt ikki at hent.

Verjin helt hinvegin, at tað hendir so nógv i býnum, og tað er meira tilvildarligt, hvørjar slíkar hendingar enda í rættinum. Hann nevndi eisini, at duravørðarnir høvdu valt at dragsa kvinnuna, sum fekk glasið i høvdið, út fyri at fáa frið, og ikki ta ákærdu. Hann helt tað vera órímiligt at revsa ákærdu kvinnuna, og at hin, sum var atvoldin til hendingina, slapp frá øllum.

Dómarin helt, at uttan mun til um ákærda við at kasta glasið hevði ætlað at rakt hina kvinnuna ella ei. Vanlig revsing fyri slík brotsverk er 40 daga treytaleys fongsulsrevsing, men dómarin valdi at døma kvinnuna við treytaðari fongsulsrevsing, tí kvinnan var provokerað, er ongantíð áður revsað, og haraftrat var gingin so long tíð frá hendingini, til málið kom fyri rættin. Royndartíðin varð sett til eitt ár. Hetta merkir, at kvinnan sleppur frá at fara inn at sita, um hon einki revsivert gera næsta árið.

Kvinnan skal gjalda sakarmálsútreiðslurnar.

---

# Langasandur fær bygdarhús


*Bjørgheðin Jacobsen er formaður í bygdarfelagnum á Langasandi*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Í summar stovnaðu langasandsfólk bygdarfelag, sum skal yvirtaka gamla skúlan**

BYGDARLÍV
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í juli mánaði stovnaðu fólkini, sum búgva á Langasandi, bygdarfelag, og tað hevði sína serliga orsøkir.

Skúlin læt aftur sum skúli mitt í 60-árunum, og síðan hava tey brúkt skúlan til at hava gudstænastu í, bingo og annað.

Sunda kommuna hevur ikki brúk fyri bygninginum, ið er frá 20-árunum, og í fleiri ár hevur verið tosað um, at langasandsfólk kundu yvirtikið skúlan.

Málið var fyri í fíggjarnevndini í seinastu viku og kemur fyri á kommunustýrisfundinum í kvøld.

Smá 40 fólk búgva á Langasandi.

Langasandbørn ganga nú í skúla í Vík.

Tá ið bygdarfelagið varð stovnað, varð Bjørgheðin Jacobsen valdur til formann.

Hann sær tað sum ein praktisk loysn, at bygdin yvirtekur skúlan, ið harvið ikki verður tikin niður.

Ætlanin er at seta hitapumpu upp í skúlanum.

Tey eru enn ikki komin so langt sum at tosa um, hvussu felagið skal fíggja raksturin av húsinum. Nakað kunnu tey fáa inn við tiltøkum, eitt nú við bingo, men tað skuldi eisini borið til at leigað húsið út til okkurt slag av barnaansing, tí økið er stikað inni.

